


**Nr. 23** **15. november 2015** **75. árg.**

# Satt ríkidømi

*Tí at um onkur hevur almikið góðs, so stendur tó ikki lív hansara í tí, sum hann eigur.*

*Luk. 12,15.*

Ein gomul søga sigur frá einum kongi, sum altíð var í ringum lag. Hann var ein mætur valdsharri og ógvuliga ríkur; men aldri glaður. Ongin lækni fekk lekt hann, og ongin vísmaður fekk hjálpt honum. Ein dagin kom ein gamal maður niðan á slottið. Hann gav kongi tey ráð, at um hann bara eina nátt slapp at sova í skjúrtuni hjá eydnuríkasta manninum í heiminum, so fór tunglyndið at hvørva, og í staðin fór hann at fáa eina djúpa og sanna gleði. Hesi ráðini dámdi kongi væl. Og hann sendi sveinar sínar út at leita upp heimsins eydnuríkasta mann.

Teir leitaðu og leitaðu, og har vóru mangir, sum fegnir vildu selja kongi eina skjúrtu. Men tá ið saman um kom, var altíð okkurt, sum gjørdi, at teir ikki vóru fullkomiliga glaðir og eydnuríkir – og tí spurdist onki burtur úr handlinum. Men so langt um leingi funnu kongsins sveinar ein, sum helt uppá, at hann var heimsins eydnuríkasti maður. Og hvussu teir so tráspurdu hann, so funnu teir ikki so frægt sum ein skugga, ið kundi dimma fyri eydnu hansara. Tá gjørdust sveinarnir fegnir og buðu manninum nógvan pening, um hann vildi selja kongi skjúrtuna.

Men heimsins eydnuríkasti maður flenti bara at tilboði teirra. Hann fekk ikki latið teimum skjúrtuna, tí hann átti onga....

Hatta er bara ein søga; men í henni er fjaldur ein djúpur sannleiki, sum undirstrikar Jesu orð, *at um onkur hevur almikið góðs, so stendur tó ikki lív hansara í tí, sum hann eigur.*

# Einglavernd

(Ein uppliving)

*Eru einglarnir ikki tænandi andar, sum verða útsendir til hjálpar teirra vegna, sum skulu arva frelsu.* *Hebr.1,14*

Eg havi lært og altíð trúð, at einglar eru Guds sendiboð, sum skulu hjálpa okkum menniskjum. Hetta havi eg altíð litið á. Tí var hetta, sum mær var fyri, ein undurfull opinbering, og eg vil, at onnur skulu fáa lut í hesum.

Brádliga gjørdist eg illa sjúk og varð alt fyri eitt innløgd á Landssjúkrahúsinum, har góð og dugnalig fólk vóru um meg – læknar og sjúkrarøktarfrøðingar. Næst Gudi skulu tey hava mína hjartans tøkk. Eg varð løgd undir skurð og komst undan. So illa stóð til, at eg lá við andingartóli, og boð vórðu send eftir mínum kæru. Eg hevði vitið; men so brádliga varð eg í huganum og andaliga borin av sóttarsongini í kirkjuna, har eg 8. oktobur 1950 varð konfirmerað og játtaði dópssáttmála mín. Eg var stødd miðskeiðis í kirkjuskipinum, og úti í forkirkjuni var mongd av fólki og einglum. Summi fólk grótu, summi sungu. Hetta vóru kend og livandi fólk, næstringar og vinfólk. Har var ein fjøld av Guds einglum. Einglarnir stóðu sum ein lýsandi bogi yvir fólkinum. Ein eingil sveimaði upp og niður, aftur og fram úti í forkirkjuni. Dyrnar vóru opnar. Eingilin sveimaði høgt og lágt. Meðan eingilin sveimaði aftur og fram, fyltist alt kirkjurúmið við himmalskum songi og tónleiki. Hesin yndisligi songurin og tónleikurin komu nærri og nærri. Eg kendi eina so undurfulla sælu, henda vakra ljóman, og burtur var allur ótti.

Tá hugsaði eg, at tá ið eingilin setir seg niður, tá verði eg flutt heim. Týðiliga sá eg inn í eyguni á mínum kæru, sum stóðu um songina. Í eygunum í teimum sá eg, hvat tey hugsaðu og væntaðu: *nú fer hon!*

Men Gud fái lov og tøkk: mær untist lív aftur! So hoyrdi eg tey tosa um, at læknin segði, at í morgin skal hon sleppa úr andingartólinum; men eg slapp ikki fyrr enn dagin eftir. Tá ið eg slapp úr andingartólinum, var tað fyrsta, mær rann í huga, songurin hjá pápa:

*“Nú leiti eg til tína náði*
*og gevi meg tær í hond.”*

Og so rann mær eisini í huga hin spitalska, sum gav Gudi allan heiðurin. Har stendur hon so vøkur – kirkjan, har eg játtaði mín dópssáttmála. Tá ið eg komi fram við henni ella eri í kirkju har, birtist henda opinberingin fyri mær, og ein innilig tøkk til Gud ljómar innan í mær.

E. H.

# *Vælkomin, Harri!*

*"... at Kristus má búgva við trúnni í hjørtum tykkara..." Ef. 3,17.*

Orðið búgva merkir meir enn bara at flyta inn sum gestur. Tað merkir at kenna seg heima og taka sær av viðurskiftunum í húsinum. Um vit skulu vera heilt sonn, hvussu mong okkara eru so fús at geva Kristusi fullkomið eftirlit?

Vit síggja hesar sjónvarpssendingarnar, har fólk loyva einum ella øðrum at koma inn og broyta heim sítt ella urtagarðin. Viðhvørt skifta tveir bólkar, sum eru vinir ella familja, um hús og broyta okkurt rúm í húsinum hjá mótpartinum uttan frammanundan at hava lagt nakra ætlan ella ráðført seg við tey, og tey, sum eiga húsini hava onga trygd fyri, at teimum kemur at dáma broytingina. Luttakararnir geva programmleiðaranum lyklar sínar, og hann gevur hinum partinum teir. So byrja tey. Tey dragsa gólvteppið út, taka gardinurnar niður og taka myndirnar niður av veggjunum, blaka innbúgvið burtur, mála í nýggjum litum og gera alt, sum tey vilja. Ein amerikonsk sending kallast "Víðgongd broyting". Í tí sendingini gera tey so nógv av, at tey skræða øll húsini niður og byggja tey uppaftur frá grundini eftir einari nýggjari ætlan. Familjan verður send út at ferðast, meðan alt fer fram. Tá ið tey koma heim, hava arbeiðsfólkini stílað fyri einari stórari móttøkuveitslu, grannarnir eru bodnir við í veitsluna, og familjan sker í grát av gleði um úrslitið.

Álvaratos - um vit kunnu vísa øðrum menniskjum slíkt álit, so mugu vit kunna loyva Kristusi at koma inn í hjørtu okkara og kenna seg heima har. Tað er púra vist, at vit á ongan hátt fara at angra, hvat ið spyrst burtur úr tí. Tá ið vit geva Jesusi lykilin til hjarta okkara, prýðir hann tað við kærleika, gleði og friði. Hann leggur leidningar inn av nýggjum, sum binda okkum við Heidlaga Andans kraft.

Kann tað vera betri?

"... et Ord til Dagen" *Effie Campbell* umsetti.

# *Hin órannsakiligi ríkdómurin*

Fyri hundrað árum síðani undraðust fólk á tráðleysa telegrafin og flogførini, sum sveimaðu gjøgnum luftina. Í dag eru vit givin at undrast - á milliónir av tráðleysum fartelefonsamrøðum, sum verða talaðar samstundis, yvir fylgisveinasamband til fjarastu støð á jørðini.

Um menniskju kunnu klára slíkt, sigi eg bara: Hugsa ikki ov smátt um Gud. Hann hevur eitt hjarta, sum lurtar eftir tí, sum er smátt, men sum er stórt fyri teg. So stórur er hann, at hann kann lurta eftir milliardum av tráðleysum bønum samstundis. So góður er hann, at hann sendi Jesus sum frelsara at lata dyr upp fyri tær.

Paulus ápostul kallar hesi góðu tíðindini "*gleðiboðskapin um hin órannsakliga ríkdóm Krists.*" (Efesus 3,8). Hetta er eitt ríkidømi og ein kærleiki, sum vit ikki fata, men sum vit bara kunnu taka ímóti við tøkk.

---

Jesus sigur, at vit ikki skulu stúra. Sum trúgvandi eru vit limir á Kristi likami. Hann fer ongantíð at lata sítt egna likam líða nakra neyð, so gevst við hasi stúranini

*e.c.* ums.

---

Skýggini kunnu fjala sólina; men tey kunnu ikki beina hana av vegnum. Hon kemur altíð fram aftur. Tað ger Gud eisini.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | |
|---|---|---|---|
| 15. nov. | Tekstur: 1.Mós. 1,27-28; | bíbliuorð: | 1.Mós. 1,27a |
| 22. nov. | Tekstur: 1.Mós. 4,1-12+16; | bíbliuorð: | 2.Mós. 20,13 |
| 29. nov. | Tekstur: 1.Mós. 6,9-22 og 7,6-7+17+21; | bíbliuorð: | 1.Mós.6,22 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




***Nr. 24*** ***29.november 2015*** ***75. árg.***

# Snjóhvíta liðið

Tá ið øll tey frelstu gjøgnum allar tíðir savnast í Himlinum framman fyri Guds og Lambsins trónu, tá tosa vit ikki longur um tann lítla flokkin, men tann stóra, hvíta skaran. Óteljandi er hesin herurin av Jesu sonnu eftirfylgjarum, sum nú er náddur fram á málið fyri trúgv teirra, frelsu sálanna.

Hvør hoyrir til henda stóra hvíta skaran? Har eru profetar og ápostlar og øll sonn og trúgv vitnir frá fyrsta degi og til tíðarinnar enda. Tað eru øll tey, sum komin eru út úr trongdini miklu, tey, sum hava tvigið klæði síni hvít í lambsins blóði, tey, sum trúðu á fyrigeving syndanna, og sum vórðu varðveitt í Guds frelsandi náði, tey, sum stríddust og strevaðust í Harrans heri og sum varðveittu trúnna og fullrunnu skeiðið, so tey sigrandi náddu heim í Kristi kraft.

Kennir tú nakran í hesum stóra, hvíta flokkinum? Har sært tú tíni kæru, sum doyðu í trúnni á Jesus, og mangar av vinum tínum, sum nú eru heima hjá Gudi! Og einaferð vænti eg av Guds náði sjálvur at sleppa at leggja upp í tann stóra, hvíta skaran, sum syngur song Mósesar og song Lambsins.

*Ein dag so søkkur sól í kav*
*og klæðir kvøldarskýggj í gull,*
*tá býður hann, sum lívið gav,*
*mær inn í høll so dýrdarfull.*
*Eg frelstur skal úr synd og trá*
*andlit til andlit Jesus sjá*

# Har eri eg mitt ímillum

Hetta hendi fyri mongum árum síðani. Telefonin ringdi á skrivstovuni í tí kirkjuni í Washington, har forsetin Franklin Roosevelt plagdi at vera í kirkju. Ein spent rødd spurdi: “Vænta tygum, at forsetin fer í kirkju komandi sunnudag?”

“Tað kann eg ikki lova,” varð svarað í hinum endanum, “men vit vænta, at Gud kemur, og tað átti at verið nóg góð orsøk til eina hampiliga góða uppmøting.”

Flestu okkara halda, at tað er stuttligt at sleppa at síggja kend fólk nær hjá. Men alt tað størsta í lívinum er í veruleikanum ósjónligt: kærleikin, gleðin og kenslan av felagsskapi.

Vit áttu ikki at gjørst liðug at undrast á, at himmalsins Gud kemur til okkara, tá ið vit koma saman í Jesu navni til gudstænastu ella møti. Jesus segði: “Tí at hvar sum tveir ella tríggir eru komnir saman í mínum navni, har eri eg mitt ímillum teirra.” (Matt.18,20).

# Hann kennir teir

Ein maður var á ferð í einum fremmandum landi, og har kom hann í prát við ein hirða við einum rættiliga stórum fylgi. Tann fremmandi spurdi hirðan, hvussu nógvan seyð hann átti. Nei, hirðin mátti viðganga, at hann dugdi ikki at telja, so hann visti ikki, hvussu nógv hann átti. “Hvussu kunnu tygum so vita, um ein ella tveir seyðir mangla?” spurdi ferðamaðurin. Svarið var einfalt og vakurt: “Eg hevði vitað tað, ikki tí at talið var vorðið minni, men tí at eg hevði saknað andlitini.”

Visti tú, at seyðir hava andlit? Ikki bara tað - teir hava ymsa persónligheit.

Jesus er hin góði hirðin. Hann kennir seyðir sínar. Hann fylgir teimum, og hann saknar teg, um tú ert vilstur burtur frá honum. Bíblian sigur: *“Harrin er góður, verja á trongdardegi; hann kennir tey, sum troysta á hann.”* (Náh. 1,7).

*Tú hirði góði røkta meg,*
*og leið meg á tí bratta veg,*
*sum gongur til ta góðu jørð,*
*har iglagrasið ikki grør.*

# Umvending er neyðug

Í Luk. 13,5 lesa vit, hvat ið Jesus sjálvur sigur: "...men um tit ikki venda um, tá skulu tit allir umkomast á sama hátt." Síðani fer Jesus (vers 6-9) at siga fólkinum eitt líknilsi. Hann greiðir frá einum manni, sum átti ein víngarð. Maðurin setti eitt fikutræ niður í henda víngarðin. Tað var nokk so vanligt í Ísrael, og tá varð fikutræið altíð sett niður í ta bestu jørðina. Maðurin var spentur, hvussu mundi fara at gangast. Í trý ár gekk hann og leitaði eftir fruktum á tí; men hann fann onga.

So segði hann við víngarðsmannin: "Sí, nú havi eg í trý ár komið og leitað eftir frukt á hesum fikutræi og havi onga funnið. Høgg tað upp. Hví skal tað arma jørðina upp aftrat?" Men víngarðsmaðurin svaraði: "Harri, lat tað standa enn hetta árið, til eg fái grivið uttan um tað og taðað tað. Hvør veit, um tað tá ikki fer at bera frukt í komandi tíð; men verður tað ikki, so kanst tú tá høgga tað upp."

Her síggja vit, at Jesus undirstrikar, at tað mátti ein sonn umvending til, sum gav umvendingar fruktir. Hann leggur eisini áherðslu á, at tað hevði skund at umvenda seg, tí øksin lá longu við rótina á trænum. Hetta er júst sami boðskapur, sum Jóhannes doyparin bar: "Berið tá ávøkst, sum samsvarar við umvendingina, og hugsið ikki, at tit kunnu siga við tykkum sjálvum: Vit hava Ábraham til faðir; tí at eg sigi tykkum, at Gud er mentur at vekja Ábrahami børn av hesum steinum. Men øksin liggur longu við røturnar á trøunum, so at hvørt eitt træ, ið ikki ber góðan ávøkst, verður avhøgt og kastað í eldin." Matt. 3,8-10.

Skulu vit taka samanum, hvat ið tað er, ið Jesus vil læra okkum her, so eru tað hesi trý tingini: 1. Umvending er neyðug. Tað sigur seg sjálvt, at hevur tú eina skeiva kós, kemur tú ikki á rætta málið. Tú mást broyta kósina - venda um. 2. Tað hevur skund at venda um. Eingin okkara veit, nær ið síðsta sandskornið í okkara tímaglasi rennur út. 3. Tað má vera ein sonn umvending. Tað nyttar ikki bara at siga við munninum, at vit trúgva. Træið skal kennast av fruktunum, sigur Jesus.

*Effie Campbell*

---

Vaksandi vælstandur hevur ført til vaksandi sjálvgóðsku og ikki til vaksandi kærleika.

*e.c.* ums.

# Deyðin skal ikki vera til longur

Ein prestur sigur frá, at ein gamal maður einaferð kom til sín og segði, at kona sín var deyð hetta kvøldið. Tey bæði høvdu livað eydnurík saman í mong ár, næstan seksti ár. Hetta eru fleiri ár, enn teimum flestu er unt. Men so kom deyðin og gjørdi skilnað teirra millum. Hjúnini vóru fyrireikað, og hon, sum Harrin hevði kallað heim, doyði stillisliga í trúnni á Frelsara sín.

Men tó bar deyðin manni og børnum sorg og sakn, og soleiðis eru okkara jarðisku kor. Tó at deyðin fyri okkum, sum trúgva á lívsins Harra, hevur mist sín brodd, so leggur hann yvir jarðarleið okkara ein tungan skugga av sakni og einsemi og skilnaði. Men í himlinum skal alt vera øðrvísi. Har er ikki sorg og saknur, ikki einsemi og skilnaður. Har eru ongi tár, ongin pína, onki skríggj – og deyðin skal ikki vera til longur.

O, Gud fái lov og tøkk fyri hetta! Deyðin skal ikki vera til longur. Ongin synd, ongin deyði, men ein vælsignað ævig sæla!

Hagar skulu vit øll stevna, har skulu vit hittast aftur fyri ongantíð aftur at skiljast. Har skulu vit saman tilbiðja og lovprísa Jesusi, sum hevur sigrað á deyðanum og givið okkum lívið.

*t.* týddi.

---

Jesus segði: Grøð tey sjúku, loys tey bundnu. Vekingin byrjar við tí. Vit samlast ikki um traditiónir, men um ein persón, Jesus.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 29. nov. | Tekstur: | 1.Mós. 6,9-22 og 7,6-7 +17+21; | bíbliuorð: | 1.Mós. 6,22 |
| 6. des. | Tekstur: | Jes. 7,14+9,6; | bíbliuorð: | Jes. 9,6a |
| 13. des. | Tekstur: | Luk. 1,26-38; | bíbliuorð: | Luk. 1,28b |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74